**Skuldsettur fyri harðskap**

Ein maður í Havn varð sunnudagin skuldsettur fyri harðskap.
Boð vórðu send eftir politinum, tí ilt varð komið millum mann og konu á bústaði teirra.
Sambært politinum hevði maðurin sligið konuna, og hann varð tí skuldsettur fyri harðskap.

# Fronsk krimisøga um Føroyar




**25 ára gamli Roch-Alexandre Kursner úr Geneve er hugtikin av Føroyum. Hann hevur verið her einaferð og hevur júst givið út krimisøguna ”La complainte des baleines” á fronskum. Søgan fer fram í Føroyum**



Beate L. Samuelsen
beate@dimma.fo

Herfyri gav hin ungi Roch-Alexandre Kursner út eina krimisøgu, sum fer fram í Føroyum.

Roch-Alexandre Kursner er hálvur franskmaður og hálvur schweizari. Hann, sum tosar franskt, býr í Geneve í Schweiz og er 25 ára gamal. Hann hevur lisið løgfrøði á universitetinum har.

Tá Roch-Alexandre Kursner var 13 ára gamal fekk hann kunnleika um, at langt har norðuri í Atlantshavinum, lá eitt oyggjaland, sum æt Føroyar. Hetta var, tá hann á skúlabókasavninum Geneve lænti eina bók um bók Norðurlond, har eitt sindur stóð at lesa um fyrst Ísland og síðani Føroyar.

Um Føroyar stóð m.a., at tær hoyrdu til Danmark, men høvdu egið gjaldoyra, egin frímerkir, tjóðsang og mál.

## Fáar útlendskar Føroyabøkur

Roch-Alexandre Kursner helt ikki, tað kundi bera til, at eitt tilíkt land var til.

Tá hann í 1995 sum skúlanæmingur saman við hinum í flokkinum í franskt-tímanum skuldi greiða frá onkrum serligum, gjørdi hann av at tosa um Føroyar.

Frá tí degi setti hann sær fyri at lesa alt um Føroyar, sum hann kundi fáa fatur á. Fyrst á fronskum. Men tað var ikki lætt, tí bert fáar bøkur eru á fronskum um Føroyar. Og hetta eru alt gamlar bøkur. So royndi hann at fáa fatur á týskum og enskum bókum um oyggjarnar. Tá gekk betur.

Hann teknaði eisini eitt haldaragjald á Frímerkjadeildini á Postverki Føroya, sum hann rósar upp um skýggja fyri sera gott arbeiði.

## Goymt gamla ólavsøku-Dimmu

Í 1997 vendi Roch-Alexandre Kursner sær til Ferðaráð Føroya og spurdi, um tað var gjørligt at fáa eitt eintak av Dimmalætting.

Ein mánað seinni lá Dimmalættingin í postkassa hansara. Hann hevur goymt hesa Dimmuna. Hon er dagfest leygardagin 26. juli 1997 og hevur verið hin seinasta undan ólavsøkuni tað árið.

Í Dimmalættingini, sum Roch-Alexandre Kursner fekk sendandi úr Føroyum, nevnir hann greinarnar ”Fiskur og olja, hond í hond” og ”Ólavsøkudagar eisini arbeiðsdagar” o.s.fr.

Nøkur ár seinni, í 2004, hitti Roch-Alexandre Kursner nakrar føroyingar í Bosnia Hersigovina. Eftir hetta segði hann við seg sjálvan, at nú mátti hann altso fara til Føroyar skjótast gjørligt.

## Í bølamyrki til Sørvágs

Árið eftir kom Roch-Alexandre Kursner hendavegin og steðgaði í tvær vikur.

- Tað skal eingin ivi vera um, at hetta hevur verið mín besta ferð nakrantíð, sigur hann við Dimmalætting.

Hann lendi í Vágum klokkan tvey um náttina og fór síðani í bølamyrki til gongu til Sørvágs, har hann gisti.

Dagarnir í Føroyum gingu alt ov skjótt, m.a. var hann úti í Mykinesi í tríggjar dagar. Hann var bergtikin av tí nógva lundanum, sum hann sá har úti. Eisini gekk hann í regni og mjørka eftir gomlu gøtuni úr Bø til Gásadals og tumlaði so heimaftur við einum trucki gjøgnum Gásadalstunnilin, sum ikki var liðugur um hetta mundi.

## Ein krimi-opinbering

Eisini í Norðoyggjum steðgaði Roch-Alexandre Kursner í nakrar dagar. Har gekk hann m.a. til gomlu og í dag útdeyðu bygdina Skarð, fekk sær ein øl í Klaksvík, gekk gjøgnum myrku og smáu tunlarnar har norðuri, gekk upp um fjallið úr Saksun til Tjørnuvíkar.

Hann var og hugdi eftir filmi í Havnar Bio, vitjaði í Nólsoy og Kirkjubø, og keypti fyrstu fløguna hjá Eivør.

Størsta ítriv Roch-Alexandre Kursner hevur, er at lesa krimisøgur.

Ein dagin fekk hann næstan eina opinbering: Hann mátti skriva eina krimisøgu, sum fór fram í Føroyum.

Sum sagt, so gjørt. Hann fór í gongd við at skriva, og í dag er fyrsta kriminalsøga hansara ”La complainte des baleines” (Teir gremjandi hvalirnir) komin út sum bók á bókaforlagnum ”Éditions du polar”.

## Føroysk orðatøk

Bókin hjá Roch-Alexandre Kursner ”La complainte des baleines” er um løgreglumannin Andrias Djurhuus, sum skal loysa eitt drápsmál. Til at hjálpa honum í arbeiðinum, kemur kriminalløgreglumaðurin Jens Hansen úr Keypmannahavn hendavegin at hjálpa starvsfelaga sínum at uppklára óhugnaliga drápsmálið. 20 ár eru liðin, síðani nakar er dripin í Føroyum.

Tað eru tvey børn í Bø, sum funnið hava eitt lík, ein manskropp, niðri við sjóvarmálan. Í fyrstuni verður hildið, at maðurin hevur verið áhaldsin í einum grindadrápi í Bø stutt frammanundan og er dottin fyri borð. Men hetta er neyvan rætta søgan um hendingina, tá samanum kemur.

Søgugongdin fer fram í Havn, Tjønuvík, Bø, Nólsoy og aðra staðni, har rithøvundin Roch-Alexandre Kursner sjálvur hevur verið.

Í bókini nýtir hann av og á føroysk orðatøk, sum hann hevur umsett tik franskt, t.d. ”Knívleysur maður er lívleysur maður” - ”Un homme sans couteau est un homme sans vie”.

Eftir at hava latið fyrstu krimibók sína úr hondum, umhugsar Roch-Alexandre Kursner at fara undir ta næstu heilt skjótt.



25 ára gamli Roch-Alexandre Kursner úr Geneve hevur skrivað fyrstu fronsku krimisøguna, sum fer fram í Føroyum. Hon eitur ”La complainte des baleines”

Dimmalætting gevur innlit
...eisini úteftir
Dimmalætting